## Stórt tiltak í Bygdarhúsinum

**Strendur:** Leygarkvøldið verður eitt serstakt tiltak í samband ið Fjarðastevnuna. Tá verður nevniliga stórt mótashow har fyritøkur úr bygdini og aðrastaðni fara at vísa fram pløgg til ymisk høvi. Fyritøkurnar sum luttaka eru Snældan, Josi, Tara, Jungman og Shop In, og hjá Sannu við undirklæðum. Umframt hesi luttekur eisini Stutt og Greitt við tí nýggjasta hármótanum.



## Fundir úti og inni

**Fjarðastevna:** Á stevnuni á Strondum um vikuskiftið verða eisini fleiri kristilig tiltøk. Ein lastbilur við palli er fingin til endamálið, og hann verður longu tikin í brúk til eitt útimøti í annaðkvøld kl. 22, tá fólk úr Kelduni í Skálabotni fara at skipa fyri. Leygarkvøldið eru tað fólk úr missiónshúsinum á Strondum og sunnukvøldið úr samkomuni Immanuel í Havn sum skipa fyri. Sunnudagin er sum vanligt gudstænasta kl. 11 í Sjóvar kirkju, har Jógvan Fríðriksson prædikar.

# Fólk byggja hagani tey eru ættað



- *Vit vilja skapa umstøður fyri vøkstri her í Kolbanargjógv, sigur Malena Thomsen*

*Mynd: Høgni Thomsen*

*"Eingin ivi er um, at onnur vilja koma hendavegin, tá Skálafjarðartunnilin kemur*

**Tað eru nógv ár liðin síðani seinastu sethúsini vórðu bygd í Kolbanargjógv. Nú bendir mangt á, at gongd fer at koma aftur á húsabyggingina í hesi bygdini í Sjóvar kommunu**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kolbanargjógv:** – Fólk vilja fegin byggja á tí staðnum, hagani tey eru, sigur Malena Thomsen, borgarstjóri í Sjóvar kommunu.

Henda áhugan kunnu tey eisini staðfesta á kommunuskrivstovuni, og nú verður arbeitt við at skapa umstøðurnar fyri hesum vøkstrinum.

Á Strondum er rættiliga stórur áhugi fyri búseting. Har standa fleiri fólk á bíðilista, hóast kommunan beint nú er í ferð við at stykkja út í bygdini.

Sama gongdin vísir seg á Selatrað, har nøkur fólk hava bíðið um grundøki.

- Her hjá okkum er í størstan mun talan um fólk úr bygdunum í kommununi. Men eingin ivi er um, at onnur vilja koma hendavegin, tá Skálafjarðartunnilin kemur, sigur Malena Thomsen.

Í mars mánaði í ár búðu beint omanfyri 1000 fólk í kommununi. Alt bendir á, at hetta talið bara fer at økjast enn meiri framyvir.



*Pláss verður fyri eini seks grundøkjum aftrat norðarlaga í bygdini*

*Mynd: Høgni Thomsen*

### Fleiri grundøki

At fólk nú ynskja at búseta seg í Kolbanargjógv er eitt, ið man hóva teimum væl ið fáast við hagtøl um bústaðarmynstur í Føroyum.

Sama man eisini gera seg galdandi fyri fólk í kommununi, tí gongdin hevur bent júst henda vegin tey seinnu árini:

Í 2004 búðu 33 fólk í bygdini og í fjør var talið komið uppá 39. Í mars mánaði var íbúgvaratalið hækkað enn meiri, og var tá uppi á 41 íbúgvum í Kolbanargjógv.

Fleiri ungfólk eru eisini í, og vísir tað seg at onkur teirra hevur áhuga at búseta seg í heimbygdini. Hetta samsvarar eisini væl við ta útstykkingarætlanina, sum Sjóvar kommuna hevur norðarlaga í bygdini, har tað eftir øllum at døma verður pláss fyri eini seks grundøkjum.

Umframt hesi hevur kommunan ætlanir um eitt heilt annað slag av bústaðarbygging í Kolbanargjógv. Hetta var sum ein partur av teirri umfatandi Menningarætlanini fyri kommununa, sum varð løgd fram í fjør.

### Tunnilin setur ferð á

Á skrivstovuni hjá Sjóvar kommunu hava tey ikki enn staðfest nakran stóran vøkstur í umsóknunum eftir grundøkjum í Kolbanargjógv.

Nógv hevur verið tosað um ætlaða Skálafjarðartunnilin, og enn er arbeiðið á fyrireikingarstigi.

- Men eg vænti, at tá ein av álvara fer undir at bora fyri tunlinum, fara fólk eisini at vilja búseta seg her, sigur Malena Thomsen.

Tá tunnilin verður liðugur, verður stutt hjá fólki at koyra til Havnar. Umframt hetta hevur Kolbanargjógv sjáldsama góðan sólargang og gott útsýni.

Í dag hevur kommunan útvegað sær tað mesta av jørðini í sambandi við hesa ætlaðu útstykkingina, eins og byggisamtyktin er broytt samsvarandi hesum.

Í grannabygdini norðanfyri, Morskranesi, sum eisini er við í Sjóvar kommunu, er kortini ikki sama støðan:

- Enn er ikki serligur áhugi fyri at byggja har. Men tað man fara at koma, tá útstykkingin byrjar her í Kolbanargjógv, slær Malena fast.